# Rútmiska kórið Glymur 25 ár

**Leygardagin verður konsert við Glymi í Kommunuskúlahøllini í Havn**

**KONSERT**

Í ár hevur Glymur 25 ár á baki. Kórið hevur gjøgnum hesi 25 árini havt ymsar leiðarar, nevnast kunnu m. a. Sunnleif Rasmussen, Jógvan Telling, Palli Hansen, Julian rasmussen og seinast, men ikki minst Ingun Hentze, sum nú stjórnar kórinum. Ingun Hentze er somuleiðis fyrsta kvinnan, ið stjórnar Glymi.

Glymur er eitt kór, har lívsglað fólk hittast hvørja viku til venjingar. Fólk úr øllum ættum, sum ikki hava annað til felags, enn lívsgleðina og sangin.

Leygardagin komandi klokkan 16 verður høvi hjá fólki at hoyra Glym framføra spennandi skrá av rútmisku verkum í Kommunuskúlahøllini.

Ingun Hentze hevur við sínum góða úrvali av sangum gjørt rútmiska kórið enn meira rútmiskt.

Julian Rasmussen, ið er undir útbúgving á Musikkonservatoriinum í Århus, er komin heim at spæla undir hjá kórinum, umframt at hann sjálvur hevur klaverframrørslu.

Næstá skránni hjá kórinum verður ein várkonsert, sum samstundis verður ein jubileumskonsert.

Glymur er partur av vetrarskránni hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og Listaskúla.



*Rútmiska kórið Glymir undir venjing í Kommunuskúlahøllini í Havn mikukvøldið. Leygardagin klokkan 16 verður kórið at hoyra á heystkonsert í Kommunuskúlahøllini*



*Ingun Hentze er kórleiðari hjá Glymi*



*Julian Rasmussen, fyrrverandi kórleiðari hjá Glymir hevur klaverfylgispæl á konsertini*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot av vestri, turt og sólglottar og hitin um 5 stig. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og regn. Hitin um 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi, týsdagin snarar hann í útnyrðing. Ælingur, sum fráliður kavi og hitin millum 1 og 5 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | -- |
| Madrid | -- |
| Róm | 22 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 35 |
| New York | 16 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 986 hPa. skamt í landnyrðing úr Føroyum fer skjótt eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/10 kl. 06⁰⁰ – 12/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 11/10 kl. 06⁰⁰ – 12/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 130 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober Fullmáni
17. oktober Mánin næstur jørðini
21. oktober Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. okt | 8:03 | 20:29 | 7:03 | 19:29 | 7:18 | 19:44 | 10:03 | 22:29 | 11:03 | 23:29 | 6:18 | 18:44 | 5:18 | 17:44 | 8:18 | 20:44 | 9:18 | 21:44 | 7:48 | 20:14 | 9:03 | 21:29 |
| 17. okt | 8:56 | 21:26 | 7:56 | 20:26 | 8:11 | 20:41 | 10:56 | 23:26 | 11:56 | - | 7:11 | 19:41 | 6:11 | 18:41 | 9:11 | 21:41 | 10:11 | 22:41 | 8:41 | 21:11 | 9:56 | 22:26 |
| 18. okt | 9:56 | 22:26 | 8:56 | 21:26 | 9:11 | 21:41 | 11:56 | - | 0:26 | 12:56 | 8:11 | 20:41 | 7:11 | 19:41 | 10:11 | 22:41 | 11:11 | 23:41 | 9:41 | 22:11 | 10:56 | 23:26 |
| 19. okt | 10:57 | 23:27 | 9:57 | 22:27 | 10:12 | 22:42 | 0:26 | 12:57 | 1:26 | 13:57 | 9:12 | 21:42 | 8:12 | 20:42 | 11:12 | 23:42 | - | 12:12 | 10:42 | 23:12 | 11:57 | - |
| 20. okt | 11:57 | - | 10:57 | - | 11:12 | - | 1:27 | 13:57 | 2:27 | 14:57 | 10:12 | 23:15 | 9:12 | 22:15 | - | 12:12 | 0:42 | 13:12 | 11:42 | - | 0:27 | 12:57 |